Farið verður undir seinastu sýningarnar av stór-leikinum "Per Gúnt"

TÍÐINDASKRIV

Per Gúnt á Gamla Meiarínum hevur verið spældur 19 ferðir.

Eftir páskir fer Gríma undir seinastu sýningarnar av sjónleikinum "Per Gúnt".

Leikurin hjá Henrik Ibsen og við leikstjórn hjá Eyðuni Johannessen hevur verið sera væl umtóktur bæði millum áskoðarar og ummælarar. Síðan frumsýningina 22. mars hava yvir 1.600 fólk sæð leikin.

Ummælarnir søgdu millum annað:

Kim Simonsen, Sosialurin: **"Eyðun og Gríma 13 fyri megnar Per Gúnt leik"**

"Í tríggjar tímar eru vit slept inn í eina gandaverð. Har eru trøll, har er svik, gorlakkar, villur grátur, deyði og stór sorg. Har er melankoli og fløktar lívsgátur. Men mest av øllum er har sjónleikur, tá hann er bestur. Veruligt drama og sorg av greskum dimensiónum"

"Hetta er ein leikur fyri øll. Fólkaskúlaklassar, miðnámsnæmingar serligani. Eg ynski øllum Føroya fólki, at tey brúka 125 krónur og fáa hetta við. Sløkkið sjónvarpið og skrubba av til sjónleik. Hatta eru eini góð ráð. Føroyski veturin er lættari at liva við aftan á. Øll kunnu læra nakað um seg sjálvan av hesum stóra Ibsen drama. Gúnt er betri enn solarium, klænkiskeið. Gúnt er í støðum eins spennandi sum ein landsdystur millum Føroyar og Týskland, har Føroyar eru á odda 2-0."

Jógvan E. Ósa, Sosialurin: *"Leiklistin stórtrívist her á landi – og seinasta prógvið er Per Gúnt"*

Carl Johan Jensen, Fregnir: **"Vilt, fyndugt og fyrilitsleyst"**

"Sýningin er stutt sagt framúrskarandi, hon hevur bæði flog og fynd.

Hetta er føroyskur sjónleikur, tá ið hann er bestur og tað er ikki ovsagt at betri undirhald er ikki og hevur verið í boði í Havn og í langa tíð."

Beata L. Samuelsen, Dimmalætting, *"Ibsen gamli bretti sær á í Meiarínum"*

"Tað andaði av leikandi og heimsferðandi list, tá leikbólkurin Gríma nærum full mannað legði alla sína orku í Per Gúnt".

Sýningarnar týs-, miku-, hós- og fríggjakvøld eru kl. 19.30.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni, og við dyrnar 1 tíma undan sýning.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara elskaði maður, pápi og abbi, verfaðir, bróður og svigarsonur

Vinjard Falkvard Joensen

andaðist páskamorgun í heiminum í Sørvági, 57 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

Marjun, Poli og Finn v/ familju

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Hertha Magnussen
á Nesi

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 19. apríl, 80 ára gomul.

Børan kemur í Nes kirkju týsdagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður mikudagin 23. apríl kl. 14.00.

Ólavur, Inga, Hanna Maria og Jóhannes

Snarferð til Billund
- við flogfari og gisting
í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
MAERSK AIR
It's got to be perfect

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi

Kaj Thomassen
Svínoy

andaðist á Norðoya røktarheimi 2. páskadag 95 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr salinum í Svínoy fríggjadagin 25. apríl kl. 13.00.

Familjunnar vegna

Tummas, Kristina, Páll, Fróði, Bjarti og Ólavur

Tey, ið ynskja at minnast Kaj kunnu lata eina gávu til Norðoyar Røktarheim, konto í Norðoyar Sparikassa.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, ið varð víst okkum tá okkara kæra mamma, vermamma og omma

Sunneva Johansen
Miðvágur

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum á ymsan hátt vóru um hana, bæði heima og á Ellisheiminum.

Tøkk til heimarøktina, heimasjúkrasystrar, tøkk til Ingu Poulsen Dam fyri góð orð á ellisheiminum og fyri sera vøkru taluna í kirkjuni.

Takk til berarar, sangarar, gravarar og tit, sum hjálptu til við ervinum og øll, sum á einhvønn hátt hjálptu til í samband við jarðarferðina.

Takk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold, takk fyri kransar, blómur og gávur til kirkjuna.

Hjartans tøkk øll somul.

Vegna tey avvarðandi

Torfinn, Birgir, Haldis og Maibritt við familjum

SUZUKI LIANA 1,6
169.500,-
Ein rúmligur familjubíllur við nógvari útgerð, so sum:
Aircondition
Alufelgur
Hiti í setrunum framman...
www.suzuki.fo
Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og Verkstaður
Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375 • Fax 31 14 96
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo • Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10